## KÍF-kapping fyri yngri deildir

Kappingarárið í flogbólti nærkast endanum, og av tí at summi halda tað vera í so tíðliga, hevur KÍF tikið stig til eina kapping aftrat fyri yngru deildirnar. Henda kapping verður í Kollafirði leygardagin 28. mars, og hon er fyri gentur og dreingir 10 ár, gentur og dreingir 12 ár, gentur og dreingir 14 ár, umframt kvinnu- og mansunglingar. Viðvíkjandi mansunglingunum er tó eitt frávik, tí har er aldursmarkið hækkað til 1993-1988, so fleiri lið koma við og kappingin verður meira spennandi.




## Eingin tveittur úr Vodafonedeildini

Loyvisnevndin, sum er umboð fyri UEFA í loyvisskipanini, tók í gjár avgerð um, at øll feløgini í Vodafonedeildini og 1. deild fáa luttøkuloyvi til kappingarárið 2009. Men hóast øll feløgini lúka treytirnar fyri luttøkuloyvi, verða trú feløg sett undir eftirlit av loyvisumsitingini, tí roknskapir teirra vísa ávaringartekin í sambandi við fíggjarligu treytirnar. Øll fótbóltsfeløg í teimum báðum fremstu deildunum skulu á hvørjum ári søkja um loyvi at luttaka í kappingunum.

# Silvur ella bronsu – ella einki

**Flogbóltskappingin hjá kvinnunum endar í dag við mest møguligum dramatikki, tí framvegis eru fýra møguligir heiðursmerkjavinnarar, tá tað kemur til silvur og bronsu. Men tað merkir eisini, at tvey lið koma at sita eftir við ongum**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Seinnapartin í morgin endar kappingin í Eikliguni hjá kvinnunum, og tað einasta, ið kann sigast við vissu, er at SÍ fær gullið sum føroyameistari. Tað er longu langt síðani, at tað var greitt, men afturfyri er alt annað púra víðopið.

Síðstu umførini hevur tað verið ein kapping millum fýra lið um at fáa silvur og bronsu, og hóast talan hevur verið um nokk so fitt av dystum, hevur tað ikki eydnast nøkrum teirra at gera ein avgerandi vørr, sum tryggjaði teimum heiðursmerki.

Av teimum fýra liðunum er tað bara Mjølnir, ið ikki kann ávirka nakað sum helst, tí Mjølnir hevur spælt sínar 18 dystir og má bara standa sum áskoðari og hyggja at, hvussu hini spæla sínamillum – hóast tað bara kann røkka til eina bronsu, tí í øllum førum onkur av hinum fer at yvirhála Mjølnir.

### Avgerandi dystirnir

Dystirnir í hesum allarseinasta umfarinum í vetur eru tveir í tali. SÍ tekur í Sørvági ímóti grannunum úr Drátti, meðan Fleyr í Gundadalshøllini fær vitjan av ÍF. Samansetingarnar av úrslitunum í hesum báðum dystunum verða sostatt avgerandi fyri, hvørji tvey lið fáa silvur ella bronsu og hvørji tvey einki fáa.

SÍ má metast sum favorittur ímóti Drátti, tí sørvágskvinnur vilja óivað vísa sínum heimafólki, at tær eisini megna at vinna seinasta dystin, nú tær skulu fáa gullheiðursmerkini um hálsin. Men samstundis er hetta grannauppgerð, umframt at Dráttur jú hevur nógv at spæla fyri, so dysturin er kanska rættiliga opin kortini.

Í hinum dystinum, sum er millum Fleyr og ÍF, er tó helst uppaftur meira opið, hvat kann henda. Fleyr hevur í vetur sæð út til at verið argasti kappingarneytin hjá SÍ og var eisini í steypafinaluni. Um formurin í síðstuni er avgerandi, hevur ÍF tó ein fyrimun, tí liðið hevur fingið væl burturúr í endaspurtinum. Men her kann altso alt henda.

### Gløðandi telefonir

Umframt, at stigini í dag hava sína avgerandi ávirkan á, hvussu endaliga stigatalvan fer at síggja út, kann eisini settmunurin spæla inn, tí hesi fýra liðini eru rættiliga jøvn. Mjølnir hevur +10, ÍF og Fleyr +9 og Dráttur +8 í settmuni, og eru liðini jøvn í stigum, verður settmunurin avgerandi.

Bæði dysturin í Sørvági og tann í Gundadalshøllini í Havn byrja klokkan 14, so lítið man vera at ivast í, at næstu tveir til tríggjar tímarnar fáa bæði Føroya Tele og Vodafone heilt fitt í kassan, sum fartelefonirnar munnu fara at gløða ymsar vegir…



*Mjølnir, sum sunnudagin spældi seinasta dystin ímóti TB, er tað einasta av teimum fýra liðunum, ið kappast um silvur- og bronsumerkini, sum ikki kann ávirka nakað. Hini trý eru ÍF, Fleyr og Dráttur*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

## Flogbóltur

**Eikligan, kvinnur**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 17 | 15 | - | 2 | 48 | 22 | 26 | 19 |
| 2 | Mjølnir | 18 | 11 | - | 7 | 41 | 31 | 10 | 14 |
| 3 | ÍF | 17 | 10 | - | 7 | 36 | 27 | 9 | 14 |
| 4 | Fleyr | 17 | 10 | - | 7 | 37 | 28 | 9 | 13 |
| 5 | Dráttur | 17 | 10 | - | 7 | 39 | 31 | 8 | 13 |
| 6 | KÍF | 18 | 5 | - | 13 | 30 | 44 | -14 | 7 |
| 7 | TB | 18 | 0 | - | 18 | 6 | 54 | -48 | 0 |

# Ársins bestu í flogbólti

**Í annaðkvøld endar flogbóltsveturin við einari gallaveitslu á hotellinum í Vágum, har hæddarpunktið verður, tá ársins bestu flogbóltsspælarar hjá kvinnum og monnum verða heiðraðir**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað er væl einki at bíða við, og nú seinastu dystirnir í hesum kappingarárinum í flogbólti verða spældir í morgin, kann tann stóra gallaveitslan hjá flogbóltinum líka so væl verða í annaðkvøld, sum at bíða til seinni við henni.

Og ótolin eru óivað fleiri av teimum, sum í vetur hava blokka, smasja, heva og alt møguligt annað fram við teimum mongu netunum kring landið. Ikki minst eru tey spent at vita, hvørji hava staðið seg best og tí skulu fáa tann heiður og ta æru, tey hava uppiborið.

Veitslan, sum SÍ og Flogbóltssambandið hava ábyrgd av, verður í annaðkvøld klokkan 19 á 62ºN Airport Hotel, har borðreitt verður við trimum rættum og eingin minni enn uttanríkisráðharrin verður borðstjóri, umframt at Sjeikarnir fara at spæla til dans aftaná.

Mest spennandi løtan og hæddarpunktið á kvøldinum verður so ímóti endanum á borðhaldinum, tá almannakunngjørt verður, hvør er kosin ársins hetta og hatta í Eikliguni hjá bæði kvinnum og monnum.

Meðan bíðað verður, ber til at stytta sær stundir við at hyggja í yvirlitið, sum vísir tey trý, sum eru innstillað til teir tilsamans 14 ymsu heiðrarnar. Í yvirlitinum standa kvinnurnar til vinstru og menninir til høgru, men annars standa nøvnini í tilvildarligari raðfylgju.

## Tey innstillaðu

**Ársins hevari**
Maja Filipovic, ÍF — Thorvald Danielsen, Mjølnir
Annika á Stongum,SÍ — Hans Fróði Jensen, Fleyr
Rakul D. Jakobsen, Fleyr — Ólavur Jensen, SÍ

**Ársins blokkleikari**
Sóley Poulsen, KÍF — Suni Juul Pedersen, Fleyr
Birita Joensen, KÍF — Jón Syderbø, Mjølnir
Hjørdis Johannesen, Fleyr — Boban Ilic, ÍF

**Ársins álopsleikari**
Gudrid Nolsøe, Fleyr — Høgni Viderø, Fleyr
Helen á Lakjuni, ÍF — Rúni Weihe, ÍF
Birgit Guttesen, SÍ — Boban Ilic, ÍF

**Ársins verjuleikari**
Margit Joensen, Mjølnir — Uni R. Petersen, ÍF
Anly Joensen, Dráttur — Hjalmar Joensen, Fleyr
Tórfríð Tavsen, SÍ — Kári Mikkelsen, SÍ

**Ársins stjørnuskot**
Urd Traðará, ÍF — Rói Hentze, Fleyr
Anja Danielsen, Fleyr — Bjarki Enni, Fleyr
Heidi Christiansen, SÍ — Emil Mikkelsen, SÍ

**Ársins venjari**
Rúni Weihe, KÍF — Boban Ilic, ÍF
Jóhan Petur á Stongum, SÍ — Eystein Elttør, Mjølnir
Hans Mikkelsen, Fleyr — Fridolin Bic, Fleyr

**Ársins leikari**
Annika á Stongum, SÍ — Thorvald Danielsen, Mjølnir
Birgit Guttesen, SÍ — Boban Ilic, ÍF
Gudrid Nolsøe, Fleyr — Rúni Weihe, ÍF